# Ein bygd í Onglandi eitur »Christmas Pie«

Navnið spillir ongan er gamalt at siga. Kortini eru tað nøvn, sum fáa fólk at trekkja uppá smílibandið. Eitt av bygdarnøvnunum, sum onglendingar og onnur dáma at stuttleika sær við er Christmas Pie – Jólakøka!. Bygdin Christmas Pie liggur vestast í landspartinum, ið nevnist Surrey. Surrey er landsluturin, sum liggur beint vestanfyri enska høvuðsstaðin London. Nærøkið har Christmas Pie liggur eitur Normandy. Hetta økið hevur mark við landspartin Hampshire. Bygdirnar og býirnir í Normandy eru: Wyke, Willey Green, Pinewood, Flexford, og so Christmas Pie. Økið er rættuliga nógv tengt at landbúnaðinum. Og sigast má, at økið er provinsielt, ella bygdasligt, um ein vil. Fitt av fólki hevur leita seg frá hesum smærru plássunum, og hevur búsett seg í størri plássum, sum Aldershot og Guildford. Summi, sum búgva í Normandy arbeiða í London, og tað tekur teimum 50 minuttir við toki at koma til London. Men Christmas Pie er kendasta staðið í Normandy. Bara av navninum!























